Útoyggjarnar mugu fáa pengar til skrivstovu

Útoyggjarnar klára ikki einsamallar at fíggja eina útoyggjaskrivstovu, sum ætlanin er at fáa at virka

ÚTOYGGJAR
Eyðun Klakstein

Fólk av útoyggjunum halda tað var gott hugskot at seta á stovn eina serliga skrivstovu, sum kann taka sær av áhugamálunum hjá teimum smáu oyggjunum.

Men skal ein slík skrivstova gerast, har lønt starvast dagliga, so mugu útoyggjarnar fáa fíggjarliga hjálp.

– Hóast útoyggjarnar halda hugskotið verða gott, og tey kunnu gjalda eitt sindur til eina slíka skrivstovu, so klára tær ikki einsamallar at fíggja eina útoyggjaskrivstovu, sigur Olga Biskopstø.

Hon var samskipari av Útoyggjaáltinum, og nú er hon við arbeiðsbólkinum, sum fyrireikar stovnanina av einum útoyggjafelagi.

– Spurningurin er so, hvussu ein útoyggjaskrivstova skal skipast og fíggjast. Møguleikarnir eru fleiri, men vit mugu fyrst kanna, um myndugleikarnir eru sinnaðir at samstarva um eina slíka skrivstovu, sigur hon.

– Enn er einki ítøkiligt í hesum, men eitt hugskot hevði verið, at landið hevði eina útoyggjaskrivstovu, sum útoyggjafelagið á onkran hátt kundi verið knýtt at, sigur Olga Biskopstø

Samstarv

Olga Biskopstø heldur, at eitt hugskot hevði verið, at ein komandi útoyggjafelagið og landsmyndugleikarnir samstarvaðu um eina skrivstovu.

– Enn er einki ítøkiligt í hesum, men eitt hugskot hevði verið, at landið hevði eina útoyggjaskrivstovu, sum útoyggjafelagið á onkran hátt kundi verið knýtt at, sigur Olga Biskopstø.

Enn hevur hon ikki tosað við løgmann um hetta mál, men tað ætlar hon sær at gera ein av komandi døgunum.

– Ein útoyggjaskrivstova hevði kunnað verið ein stór hjálp hjá fólkunum á smáu oyggjunum. Skrivstovan kundi ráðgivið og upplýst bæði til útoyggjafólk og til restina av landinum, sigur Olga Biskopstø.



Fjarrit í nýggjum hanni

Føroya Tele gevur út nýggja rað av fjarritum

Hitt 1 50ununa vórðu yvir 800.000 fjarrit send úr Føroyum til útlevfólk. Hetta var, áðrenn telefonsambandi var koyrt á útlevfólk, men tarvurin á samskifti var nógv eftir hvørt árini eftir setning heimsbarbega.

Eitt innanveyggja var tarvurin á samskifti stóran, og sjálvt um telefonin var koyrt nógvastaðni, var ann vanligt at nýta fjarritið at samskifta við.

Í dag verður fjarritið nevst nýtt til at bera fram beiðsar í sambandi við fastingarsagna, brúkleyn og verkidagar, og eisini við jarðarferðir. Í einstakum farum verður fjarritið tó framvegis nýtt at fáa boð frem í partum av heimlinum, har annað samskifti fídd er áltaandi.

Føroya Tele vil við nýggju rætini av fjarritum fáa samskiftið millum tátina, lá er farin, og dagin í dag, har ein stórur partur av samskiftinum fer fram við teldupost ella fartelefon.

Tað er eldasa vón, at fjarritið framvegis fer at verða nýtt, tá samskiftið hevur sertøgur týðning.

FØROYATELE tlf. 80 90 22

Nýggja rætin av fjarritum er prýdd við grafikki eftir listakvinnuna Jóna Rasmussen. Jóna (f. Guttesen) er 53 ára gomul, uttanfyri Havn og búsettandi í Havn. Síðani sláat í listaklúbbinum hevur hon fingist við lítt burturlu. Hon nýtir yvirhalt teknir í grafikkinum, og blandar traditionella grafikkin við teknum sum ferðarundum og fotografium. Hon hevur sýnt frem her heima og uttanlands, bæði grafikk og málningar, og er umboðað á Listasavni Føroya. Eisini hevur hon sett til flerfal vitfir og stovnar.



Tvøroyrar Býráð sagt Almannastovuna upp

Tvøroyrar Býráð hoyrdi onki aftur frá Almanna- og Heilsumálastýrinum og tí er sáttmálin um Almannastovuna nú sagdur upp.

PRINSIPPMÁL
Áki Bertholdsen

Nú er grundarlagið undir Almannastovuni í Suðuroy farið at rilla.

Tvøroyrar Býráð vil ikki longur vera við til at betala so nógv fyri Almannastovuna í Suðuroy, sum býráðið hevur gjørt higartil.

Av tí sama hevur býráðið nú sagt sáttmálan um Almannastovuna í Suðuroy, upp.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað var í 1976, at sáttmáli varð gjørdur ímillum landsstýrið og allar kommununnar í Suðuroy, uttan Vágs Kommunu, um at leggja Almannastovuna í Suðuroy. Í 1995 kom eisini Vágs Kommuna upp í avtaluna.

Eftir avtaluni betalir landið lønirnar til starvsfólkið á Almannastovuni, men kommurnar betala allar hinar rakstrarútreiðslurnar, eitt nú hølisútreiðslur, ljós, varma, telefon o.s.fr.

– Síðani er parturin hjá hvørjari kommunu tektur beinleiðis av kommunuskattinum, uttan at kommunan hevur havat nakra sum helst ávirkan. Haraftur hevur mannagongdin verið tann, at upphæddin fyri alt árið er tikin beinanvegin, fyrst í januar á hvørjum ári.

– Vit halda ikki, at vit eiga at betala fyri, at almannastovan skal vera í Suðuroy. Heldur ikki góðtaka vit, at vit onki fáa at vita og at vit onga ávirkan skulu hava, sigur Finnleif Guttesen

Harafturat eru útreiðslurnar ógvuliga nógv hækkaðar í seinastuni. Í fjør var parturin hjá Tvøroyrar Kommunu av rakstrarútreiðslunum hjá Almannastovuni í Suðuroy 88.000 krónur, men í ár er upphæddin meiri enn tvífaldað upp í 174.000 krónur.

– Hetta er hent, uttan at kommunan hevur fingið eitt einasta orð at vita um, hví útreiðslurnar eru so nógv hækkaðar.

Almannastovan søgd upp

Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki hesa mannagongd longur og tað góðtekur heldur ikki uttan víðari, at kommunan skal betala fyri at hava almannastovu í Suðuroy.

– Vit halda ikki, at vit eiga at betala fyri, at almannastovan skal vera í Suðuroy. Heldur ikki góðtaka vit, at vit onki fáa at vita og at vit onga ávirkan skulu hava.

Býráðið samtykti tí einmælt herfyri at krevja nýggjar samráðingar við Almannna- og Heilsumálastýrið um almannastovuna í Suðuroy.

Býráðið ásannaði at tað var so trupult at fáa svar frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, at tað kravdi at fáa svar áðrenn 18. september um samráðingarnar.

Men 18. september bað Almanna- og Heilsumálastýrið um at fáa tveir dagar afturat.

Tann freistin var úti hósdagin, men tað hoyrdist onki aftur. Tí hevur Tvøroyrar Kommuna nú sagt sáttmálan við Almannastovuna upp.

Sáttmálin er sagdur upp frá 1. oktober at rokna, so frá hesum degi betalir Tvøroyrar Býráð ikki longur fyri at hava Almannastovu í Suðuroy.

Stórbardagi í Havn

Sunnumorgunin vórðu tríggir ungir dreingir um seytjan ára aldur sendir á sjúkrahúsið, eftir at teir vórðu álopnir av átta ungum í miðbýnum

HARÐSKAPUR
Stefan í Skorini

Vikuskiftið fór ikki aftur um bak, uttan at løgreglan og sjúkrahúsið skuldu taka sær av fólki, sum vóru komin illa fyri av harðskapi.

Hesuferð var bardagin meira umfatandi, tí tilsamans ellivu ung fóru til hendurs.

Løgreglan greiðir frá, at sunnumorgunin umleið klokkan fýra kom ein fráboðan um harðskapin. Tríggir dreingir vórðu álopnir av trimum gentum og fimm dreingjum, sum vóru í aldrinum 14-17. Hendingin fór fram í Tróndargøtu, og tað var sambært løgregluni nakað av munnhøggi millum tey ungu, sum elvdi til álopið.

Dreingirnir fingu smáskaðar sum blátt eyga, skursl og blóðsamlingar og vórðu fluttir á skaðastovuni.

Enn er eingin tikin í sambandi við harðskapin, men løgreglan veit, hvør onkur av gerningsmonnum er, og hon arbeiðir framvegis við málinum.

eru nú

FAROESOFT
EITT FARODANE FELAG



Í sambandi við at vit hava skift navn og eru flutt, bjóða vit við skiftafólkum og øðrum áhugaðum til móttøku í nýggju hølum okkara í

Tórsgøtu 16,

friggjadagin 28. september

kl. 15.00-17.00

FAROESOFT

Tórsgøta 16 • Postboks 3119 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 350 350 • Fax. +298 350 360 • faroesoft@faroesoft.com

www.faroesoft.com